## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, týsdagin minni vindur av landnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 12 og 16 stig.

Roskilde:

# Merkið á palli við Björk



Eftir eina framúrskarandi konsert endaði íslendska trøllagentan við Merkinum og grønlendska flagginum á palli, meðan hon sang Declare Independence.

Sjálvt um regnið oysti niður og áhoyrararnir stóðu við vatni upp undir knø, megnaði Björk at bergtaka.

Okkara maður á staðnum, Niels Uni Dam, er ikki í iva:

- Tað er ikki langt frá, at konsertin var tann besta eg havi hoyrt á Roskilde øll tey átta árini, eg havi verið her.

Við sínum álvadansi, og altíð sermerktu framførslu, megnaði 41-ára gamla Björk at fáa 40.000-50.000 áhoyrarar at velja tónleikin, hóast dagurin í gjár var ringasti regndagur í søgu festivalsins.

Björk endaði framførsluna við lagnum Declare Independence, ið er ein loysingarsangur, tilognaður Føroyum og Grønlandi.

Um nakar ivaðist um hetta áður, so var tað sligið fast við tveimum risastórum fløggum, ið komu inn, tá ið sangurin byrjaði. Merkið og Erfalasorput, ið er heiti á grønlendska flagginum, veittraðu hátt, meðan Björk rópti: »Declare Independence, Don't let them do this to you. Raise the flag higher and higher«.

- Meðan Björk spældi, var ordiligt lív í fjøldini, og man gloymdi eina løtu tað vánaliga veðrið, endar Niels Uni.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 17 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 31 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 33 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 16 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1001 hPa. við Ísland fer vestureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 995 hPa. yvir Bretsku Oyggjunum fer móti Suður-Noreg.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Estlandi stendur mestsum í stað og brúgvalagið til Føroya fer spakuliga suðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/7 kl. 06⁰⁰ – 5/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06⁰⁰– 2/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 27,0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 24. juni | Máni ongst frá jørðini |
| 30. juni | Fullmáni |
| 7. juli | Seinna kvarter |
| | Jørðin longst frá sólini |
| 9. juli | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. Juli | 11.51 | - | 10.51 | 23.26 | 11.06 | 23.41 | 01.30 | 13.51 | 02.30 | 14.51 | 10.06 | 22.41 | 09.06 | 21.41 | - | 12.06 | 00.45 | 13.06 | 11.36 | - | 00.30 | 12.51 |
| 7. Juli | 00.26 | 13.00 | - | 12.00 | - | 12.15 | 02.26 | 15.00 | 03.26 | 16.00 | 11.15 | 23.50 | 10.15 | 22.50 | 00.41 | 13.15 | 01.41 | 14.15 | 00.11 | 12.45 | 01.26 | 14.00 |
| 8. Juli | 01.35 | 14.11 | 00.35 | 13.11 | 00.50 | 13.26 | 03.35 | 16.11 | 04.35 | 17.11 | - | 12.26 | 11.26 | 23.49 | 01.50 | 14.26 | 02.50 | 15.26 | 01.20 | 13.56 | 02.35 | 15.11 |
| 9. Juli | 02.34 | 14.57 | 01.34 | 13.57 | 01.49 | 14.12 | 04.34 | 16.57 | 05.34 | 17.57 | 00.49 | 13.12 | - | 12.12 | 02.49 | 15.12 | 03.49 | 16.12 | 02.19 | 14.42 | 03.34 | 15.57 |
| 10. Juli | 03.23 | 15.50 | 02.23 | 14.50 | 02.38 | 15.05 | 05.23 | 17.50 | 06.23 | 18.50 | 01.38 | 14.05 | 00.38 | 13.05 | 03.38 | 16.05 | 04.38 | 17.05 | 03.08 | 15.35 | 04.23 | 16.50 |